**Viðtøkur fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd**

**Navn**
**§ 1.** Ráðið eitur Ráðið fyri Ferðslutrygd, stytt til RFF

**Endamál**
**§ 2.** Endamál ráðsins er at gera ferðsluna tryggari við:
– at betra ferðsluvanarnar við upplýsing og fjølbroyttum fyritakssemi,
– at stuðla ferðsluundirvísingina við ráðgeving og stuðuli,
– at útvega tíðarhóskandi og viðkomandi undirvísingarmiðlar í ferðslulæru,
– at skipa fyri skeiðvirksemi og trygdarfremjandi verkætlanum
– at geva sakliga upplýsing um øll tey viðurskifti, sum eru til ampa fyri ferðslutrygdina
– at samstarva í góðum stevi og hóskandi vavi við myndugleikar, stovnar og einstaklingar í ferðslutrygdarspurningum
– at fáa støðugar og viðkomandi upplýsingar um ferðsluóhapp/-vanlukkur, skaðaorsakir o.a. at nýta í ferðslutrygdararbeiðinum og
– at fáa regluligt fjølmiðlainnivist við ferðslutrygdarboðskapi ráðsins.
Støðið verður tikið í Nullhugsjónini og Ferðslutrygdarætlanini.

**Limir**
**§ 3.** Ferðslutrygd hevur hesar føstu limir: Akstovan, Kommunufelagið, Føroya Koyrilærarafelag, Føroya Landfúta, Føroya Læknafelag, Føroya Lærarafelag, Kvinnufelagssamskipan Føroya, Landsverk, Kringvarp Føroya, Trygd, Betri Trygging, avvarandi aðalráð fyri undirvísingarmál og samferðslumál.
*Stk. 2.* – Umframt teir í stk. 1 nevndu limir kunnu eisini kommunur, aðrir almennir stovnar og og ikki vinnurekandi áhugafeløg, sum vilja vera við í ferðslutrygdararbeiðinum gerast limir.
*Stk. 3.* – Einstaklingar, vinnurrekandi feløg og fyritøkur, sum vilja vera við í ferðslutrygdararbeiðinum kunnu eisini verða limir. Limirnir í stk. 3 verða nevndir "Ferðslutrygdarvinir"
*Stk. 4.* – Ráðsfundurin tekur avgerð um limaskap, eisini um talan er um limaskap sambært stk. 2 ella 3 í hesari grein.
*Stk. 5.* – Teir í stk. 1 og 2 nevndu limir hava rætt at møta á ráðsfundi og har taka orðið og greiða atkvøðu. Teir í stk. 3 nevndu limir hava rætt at møta á ráðsfundi og har taka orðið, men hava ikki atkvøðurætt.
*Stk. 6.* – Limirnir í stk. 1 rinda eitt árligt limagjald, sum teir sjálvir áseta, tó ikki minni enn 300,- kr. Fyri limirnar í stk. 2 skal limagjaldið ikki vera minni enn 300 kr. Fyri kommunur er limagjaldið 5 kr. fyri hvønn íbúgva, roknað eftir fólkatalinum við seinastu fólkateljing, tó ikki minni enn 2.000 kr. árliga. Fyri limirnar í stk. 3 nevndir "Ferðslutrygdarvinir" er limagjaldið soleiðis: einstaklingar: í minsta lagi 150,- kr. og vinnurekandi feløg og fyritøkur: í minsta lagi 2000,- kr.
*Stk. 7.* – Ársfundurin kann eftir uppskoti frá starvsnevndini útnevna heiðurslim. Heiðurslimir hava talurætt, men ikki atkvøðurætt og rinda ikki limagjald.

**Ráðsfundur**
**§ 4.** Ráðsfundurin er hægsti myndugleiki uttan í teimum førum, tá ið góðkenning landsstýrismansins er kravd.
*Stk. 2.* Til ráðsfundin sendir hvør limur eitt umboð, sum hevur heimild at taka støðu vegna limin.
**§ 5.** Formaðurin kallar ráðið saman til fundar, tá ið tað verður hildið neyðugt. Hann ásetir fundartíð og fundarstað. Fráboðan um fund skal verða givin við 30 daga freist.

*Stk. 2.* Seta í minsta lagi 3 limir fram ynski um ráðsfund, hevur formaðurin skyldu at kalla ráðið til fundar skjótast til ber og í seinasta lagi 8 dagar eftir, at hetta ynskið er sett fram.

**§ 6.** Ráðið hevur ársfund í seinasta lagi 1. mai við hesi dagsskrá:
1. Val av fundarstjóra.
2. Ársfrágreiðing formansins.
3. Framløga og góðkenning av grannskoðaðum roknskapi.
4. Møguligt val av formanni og varaformanni.
5. Møguligt val av limum og varalimum í starvsnevndina.
6. Val av grannskoðara.
7. Innkomin mál.
8. Ymiskt.

*Stk. 2.* Uppskot til viðgerðar á ársfundinum skulu eins og uppskot til formann, varaformann og starvsnevndarlimir verða formanninum skrivliga í hendi í seinasta lagi 14 dagar fyri ársfundin og verða send limunum 7 dagar fyri fundin.

**§ 7.** Ráðsfundur er viðtøkuførur, tá ið minst helvtin av føstu limunum eru umboðaðir.
*Stk. 2.* Avgerðir á ráðsfundi verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta.
*Stk. 3.* Allir limir í Ráðnum fyri Ferðslutrygd hava gjøgnum umboð síni rætt at seta fram spurningar og uppskot um virki ráðsins.
*Stk. 4.* Avgerðir á ráðsfundi verða førdar í gerðabók, sum fundarstjórin skrivar undir. Ljóstak av fundarfrásøgnini verður send limunum.

**Starvsnevndin**
§ 8. Starvsnevndin hevur 5 limir og 2 varalimir. Formann, varaformann, 3 nevndarlimir og 2 varalimir fyri teir. Í starvsnevndini situr formaður fyri 4 ár í senn. Uppskot um formansevni kunnu fevna um persónar, ið ikki eru limaumboð, smb. § 4, stk. 2. Umframt formann velur ársfundurin sínámillum fyri 4 ár í senn 4 nevndarlimir og 2 varalimir fyri teir.
Starvsnevndarlimir kunnu verða afturvaldir.
*Stk. 2.* Starvsnevndin ger eina virkisætlan við atliti at endamáli ráðsins.
*Stk. 3.* Starvsnevndin kann seta arbeiðsbólkar til serstakar uppgávur.
*Stk. 4.* Starvsnevndin skipar seg sjálv við næstformanni, eftir at formaður er valdur."

**Skiftisreglur**
Annaðhvørt ár verða valdir 2 og 3 nevndarlimir, soleiðis at val av starvsnevndarlimum fer fram á øðrumhvørjum ársfundi. Sum skiftisregla verður ásett, at tveir starvsnevndarlimir og formaðurin verða valdir á ársfundinum í 2018 fyri 4 ár (hesi standa fyri vali aftur í 2022), meðan tveir starvsnevndarlimir verða valdir á ársfundinum í 2018 fyri 2 ár og skula veljast aftur í 2020 og tá fyri 4 ár í senn. Hetta merkir at formaðurin og tveir starvsnevndarlimir standa fyri vali aftur í 2022, men tveir starvsnevndarlimir standa fyri vali í 2020.

**§ 9.** Starvsnevndin hevur fund, tá ið formaðurin heldur tað vera neyðugt. Tó skulu í minsta lagi vera fýra fundir um árið. Formaðurin skal kalla starvsnevndina til fundar, um 2 starvsnevndarlimir ynskja tað.
*Stk. 2.* Avgerðir á starvsnevndarfundi verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Standa atkvøðurnar á jøvnum, er atkvøða formansins avgerandi.
*Stk. 3.* Tað, sum verður samtykt á starvsnevndarfundi, verður ført í gerðabók, sum verður løgd fram til góðkenningar á næsta fundi.

*Stk. 4.* Starvsnevndin ger uppskot um reglugerð fyri virksemi sítt, sum ráðsfundurin skal góðkenna.

**Formaðurin**
**§ 10.** Formaðurin er samráðingarleiðari ráðsins og ansar eftir, at tann reglugerð, sum er galdandi fyri stjóran, verður hildin.
*Stk. 2.* Varaformaðurin tekur við sum formaður, tá ið formanninum berst frá.
*Stk. 3.* Ráðið verður bundið av undirskrift formansins saman við 2 starvsnevndarlimum. Tó kann starvsnevndin geva stjóranum fulltrú at skriva undir ráðsins vegna.

**Daglig leiðsla**
**§ 11.** Starvsnevndin setur stjóran, sum eftir fyriskipan starvsnevndarinnar røkir tað dagliga virksemið. Stjórin er skrivari hjá ráðnum og starvsnevndini.
*Stk. 2.* Starvsnevndin ger reglugerð fyri starvið hjá stjóranum.
*Stk. 3.* Starvsnevndin setir fólk í starv eftir tilmæli frá stjóranum.

**Fíggjarviðurskifti**
**§ 12.** Fyri hvørt fíggjarár ger starvsnevndin eftir tilmæli frá stjóranum eina greinaða fíggjarætlan, ið er grundað á mettar inntøkur og stuðul.
*Stk. 2.* Fígging ráðsins er grundað á:
1) Árligan stuðul frá landinum.
2) Árligan stuðul frá tryggingarfeløgum
3) Limagjald.
4) Annað.

**§ 13.** Roknskapar- og fíggjarárið eru álmanakkaárið.
*Stk. 2.* Roknskapurin verður grannskoðaður av løggildum grannskoðara.
*Stk. 3.* Grannskoðaði roknskapurin verður sendur limunum 7 dagar fyri ársfundin og lagdur fram á fundinum til góðkenningar.

**Viðtøkubroytingar og avtøka ráðsins**
**§ 14.** Til broyting av hesum viðtøkum krevst góðkenning landsstýrismansins.
*Stk. 2.* Samtykkir ráðsfundur at taka ráðið av, hevur landsstýrismaðurin endaliga avgerð hesum viðvíkjandi og ger eisini av, hvat verða skal av ognum ráðsins.

**Gildisásetingar**
**§ 15.** Broytingarnar í viðtøkunum samtyktar á ársfundinum 16. apríl 2021, tá ið landsstýrismaðurin hevur góðkent tær.

***Goðkenning av broytingum í viðtøkum***
Við hesum góðkenni eg broytingaruppskotini sbrt. § 15.

Fíggjarmálaráðið, tann 29. apríl 2021

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður